# Ingeborg setir nú hart ímóti hørðum

*– Tey gistingarhús og tær matstovur í Føroyum, sum ikki vilja halda sáttmálan, kunnu nú vænta at enda á altjóða svartalista, sigur Ingeborg Vinther*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú skal skil fáast á viðurskiftini hjá hotellunum og matstovunum í Føroyum.

Fyri einum ári síðani varð sáttmáli gjørdur ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag øðrumegin og Føroya Arbeiðsgevarafelag hinumegin, sum eisini skuldi umfata starvsfólkið á hotellum og matstovum.

Men kortini hevur tað gingið ógvuliga strilti at fáa viðurskiftini í rættlag, tí framvgis eru tað bara Hotell Vágar og ein einsamøll matstova í Havn, sum vilja halda sáttmála.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag vil ikki siga, hvørja matstovu, talan er um.



*Hotell Vágar, og ein matstova í Havn eru tey einastu, sum vilja halda sáttmálan. Hini hotellini og hinar matstovurnar, kunnu nú vænta altjóða boykott*

Men hon vil ikki longur góðtaka, at hotellini og matstovunrar ikki vilja halda sáttmálan, tí hóast tey ikki eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, varð nevndin í gistingarhúsfelagnum við í samráðingunum.

Men nú hevur Føroya Arbeiðarafelag í samstarvi við Havnar Arbeiðskvinnufelag sett sær fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Ingeborg Vinther sigur, at tað leingi bara hevur verið Hotell Vágar, sum hevur hildið seg til sáttmálan.

Men beint áðrenn páskir fingu øll hini hotellini og gistingarhúsini skriv um at fáa viðurskiftini í rættlag.

– Einasta svar, vit fingu, var frá eini matstovu í Havn, sum eisini hevði fingið síni viðurskifti í rættlag, sigur Ingeborg Vinther.

Sostatt eru enn fleiri gistingarhús og matstovur kring landið, sum ikki enn hava fingið viðurskiftini í rættlag.

**Fyrireika altjóða boykott**

Men tað skal broytast nú, leggur hon avgjørd afturat.

Hon sigur, at fyrsta stigið verður at kalla øll, sum arbeiða í vinnuni til fundar at umrøða støðuna.

Men hjálpir tað ikki, er Føroya Arbeiðarafelag sinnað at taka sterkari lút í brúk fyri at loysa ósemjuna.

–Hjálpir hetta ikki, eru einastu ráð at leita sær uttanlands eftir hjálp, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at kemur ikki broyting í nú, eru arbeiðarafeløgini til reiðar at venda sær til feløg og stovnar uttanlands og greiða teimum frá støðuni, so at tað kann verða skipað fyri at hotellini og matstovurnar, sum ikki vilja halda sáttmálan, koma á svartalista og verða boykottað.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta hevur longu fingið avleiðingar, tí tað er gjørt av, at ein norðurlendsk fakfelagsráðstevna, sum verður í Føroyum í næstum, verður flutt úr Havn, vestur á Hotell Vágar. Og kemur støðan ikki í rættlag, fara vit víðari og mæla feløgum, bólkum og stovnum frá at gista á hotellum og eta á matstovum, sum ikki halda sáttmálan, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag.

# Framtíðin hjá flakavirkinum í Vági er óviss

*–Vit hava ikki havt umstøður at skipa nakra framleiðslu á flakavirkinum í Vági, men tað er kortini ein partur av framtíðarætlanunum hjá Fiskavirking, sigur stjórin*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Flakavirkið í Vági er ein partur av okkara framtíðarætlanum. Men lova nakað her og nú, tað kann eg ikki.

Sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking.

Vágbingar eru farnir at ótolnast eftir at fáa arbeiði aftur á flakavirkið í Vági.

Og nú hevur Vágs Býráð einmælt samtykt at geva Fiskavirking tveir mánaðir til at boða frá, hvørjar ætlanirnar eru við virkinum í Vági.

Og eru ongar ætlanir, fer Býráðið at krevja, at virkið verður tikið niður, so at grundstykkið kann liggja tókt til onnur endamál, um so skuldi verið.



*– Flakavirkið í Vági er ein partur av framtíðarætlanunum hjá Fiskavirking, men tað verður ikki í næstu framtíð, at arbeiði verður aftur, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Fiskavirking*

Meinhard Jacobsen hevur enn ikki hoyrt frá vágbingum veit hann ikki, hvat teir vilja.

Og fyrrenn tað, fær hann heldur ikki gjørt viðmerkingar til málið.

Annarsvísir stjórin í Fiskavirking á, at tað er ikki rætt, at onki virksemi hevur verið á virkinum í Vági.

– Vit leigaðu m.a. virkið til frostgoymslu í fleiri ár.

– Og at vit gjørdu tað, skapti grundarlagið fyri tí frystihúsið, sum seinni er bygt í Vági.

– Harafturat hevur lemmavirkið í Vági leiga ein part av virkinum fyri sera rímiliga leigu og tað hevur eisini gjørt sítt til, at teir fingu møguleika at koma á føtur.

– So tað er ikki rætt at geva fólki fatan av, at vit hava bara læst dyrnar og forða fyri øllum øðrum virksemi, sigur stjórin í Fiskavirking.

Men orsøkin til, at onki fiskaarbeiði er á virkinum, er, at Fiskavirking hevur verið so illa fyri fíggjarliga, at tað hevur ikki borið til at hugsa um nakað nýtt.

– Og at lata virkið upp til vanliga framleiðslu ber ikki til, tí tað er nóg mikið av orku til tað frammaundan, umframt at virkið í Vági krevur sera stórar nøgdir fyri at tað skal loysa seg.

Men Meinhard Jacobsen sigur, at nú eru fíggjarligu umstøðurnar nógv betri og tað ger, at tað so smátt eisini fer at bera til at hugsa um aðrar framleiðslu, enn tað, vit hava nú.

– Og í tí sambandi vóni eg, at tað fer at føra við sær, at eitthvørt virksemi eisini kann fáast á føtur í Vági.

– Men enn hava vit ikki arbeitt so hart við tí málinum.

Hann vísir eisini á, at tá ið virksemið verður aftur á virkinum í Vági, hevur tað týdning, at tað er væl kjølfest, so at tað ikki skal detta niðurfyri aftur beinanvegin, tí tað er betri ógjørt.

Hann sigur eisini, at samráðst hevur eisini verið við ymsar um at leiga, ella keypa virkið.

– Men enn mugu vit so staðfesta, at enn eru vit ikki blivin samd um ein prís fyri virkið og um onnur viðurskifti, sum skulu vera ílagi, sigur Meinhard Jacobsen.

# Hava aftur skip í kikaranum at sigla fyri Smyril

*Tey skulu kannast nærri og nú hevur tað skund, tí Smyril skal í dokk um góðar 14 dagar*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað verður meiri og meiri spennandi at verða suðuroyingur.

Tí um góðar tvær vikur skal Smyril á beding á Skála og enn hevur Strandferðslan onga hóming av, hvat skip hon fær at sigla ímillum Suðuroynna og Havnina fyri hann, tær seks vikurnar, hann verður úr siglingini.

Hartil kemur, at fyrrapartin í gjár vóru fíggjarviðurskiftini hjá Strandferðsluni heldur ikki komin í rættlag við tað, at fíggjarnevndin er ikki enn liðug at viðgera umsóknina um eykajáttan til Strandferðsluna. Og fyrrenn tað er avgreitt, hevur hon ikki ráð til at leiga eitt avloysaraskip.

Men Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at leitað verður framvegis eftir einum hóskandi skipi.

Og aftur í gjáramorgunin hevði hann fingið nøkur nøvn á borðið, sum skuldi kannast nærri.

Og á miðdegi í gjár hevði hann onga hóming av, um hesi skipini vóru hóskandi til endamálið.

–Vit hava biðið um fleiri upplýsingar og tá ið vit hava fingið teir, taka vit støðu, sigur hann.

Men nú hevur tað skund og møguleikin at finna eitt ekjuskip á sama støði sum Smyril, eru ógvuliga smáir nú, fyri ikki at siga ongir.

Tí er Strandfeðrslan líka nógv farin at hyggja eftir einum farmaskipi, sum kann flyta tann nógva farmin, men sum eisini kann taka nøkur ferðafólk. Stjórin sigur, at nú Smyril fer á beding, verður roynt at roynt at fáa hann lidnan til jóansøkuna, men tað er ikki vist, at tað eydnast, tí tað er rættiliga umfatandi, sum skal gerast.

Torleif Mikkelsen, skipsmeklari er ein av teimum, sum hevur leitað eftir skipi til Strandferðsluna og hann dugir ikki at síggja, hvussu tað skal bera til at finna ein ekjuskip, sum á sama støði sum Smyril er á. Og hann vísir á, at longri tað líður út, minni verður møguleikin. Talan er eisini um eitt lítið leigumál og skal skip útvegast til tað, við so stuttum skotbrái, kann eisini væntast, at prísurin verður hareftir.

Men hann vísir eisini á, at føroyska skipanin er alt ov stirvin.

–Áðrenn strandferðslan kann taka støðu til eitt leigumál, skal málið fyrst leggjast fyri landsstýrismannin og síðani fyri Løgtingið. Og á altjóða skipamarknaðinum skilja tey heilt einfalt ikki, hví eitt so lítið leigumál, sum hetta, skal líka í løggevandi tingið at verða viðgjørt, sigur hann.

Hann vil ikki siga, at hetta ger, at vit ikki verða tikin í nóg stórum álvara.

– Men, hvat hevði tú sagt, um tú ferð eftir ferð varð biðin at útvega eitt skip, men at tú, hvørja ferð eitt var í eygsjón, fær at vita, at avgerð kann ikki takast enn, tú málið skal fyrst ígjøgnum tað løggevandi tingið, spyr hann.





*Ternan skal skifta motorar, og verður tí tikin úr siglingeina ferð í ár*

# Ternan fær nýggjar motorar

*Høvuðsmotorarnir á Ternuni eru niðurslitnir og skulu skiftast út. Arbeiðið bíðar eftir, hvussu verður við avloysaraskipi fyri Smyril*

EDVARD JOENSEN

Høvuðsmotorarnir á Ternuni skulu skiftast. Nýggju motorarnir koma til Føroya fyrsta dagin, men ivasamt er, nær arbeiðið verður gjørt.

At Ternan skal skifta motorar kemur helst at ávirka siglingina um Vestmannasund í summar, tá Ternan annars skuldi røkt hesa rutuna. Men sum er ber ikki til at siga, nær hetta verður. Tað velst um heilt aðrar umstøður enn motorskift á Ternuni, sigur tekniski stjórin á Strandferðsluni, Magnus Magnussen.

Tað kann ljóða eitt sindur løgið, at tað skulu vera umstøður uttan fyri Ternuna, sum avgera, nær skipið siglir. Men í grundini er tað Smyril og í øðrum lagi Dúgvan, sum gera av, nær Ternan siglir.

Fyri at gera eina fløkta søgu greiða, er at siga, at einki avloysaraskip enn er funnið fyril Smyril, sum skal í dokk um hálvan mai. Tað merkir í løtuni, at Dúgvan fer at sigla til Suðuroyar, og so má Ternan aftur um Leirvíksfjørð. Eftir eru so Sam og Ternan I, sum fara at røkja rutuna um Vestmannasund, sum Ternan annars hevði verið nýtt til.

Hetta, at Ternan skal skifta motorar, er tó ikki nakað, sum nýliga er íkomið, sigur Magnus Magnussen. Tað varð avgjørt longu í november í fjør. Motorarnir vórðu umbidnir, eftir at eykajáttan upp á fýra milliónir krónur var fingin. Teir koma væntandi til Føroya í næstu viku.

Avgerðin um at skifta motorarnar varð tikin, tá greitt varð, at teir gomlu skuldu klassast. Tá varð hildið skilabetri at skifta út. Teir gomlu eru javngamlir við skipið, eini 20 ára gamlir. Hesir nýgju motorarnir eru keyptir so mikið stórir, at teir eisini klára eina longing av Ternuni, um tað skuldi komið upp á tal.

Umstøðurnar við Smyrli gera, at einki er avgjørt, nær motorarnir skulu skiftast. Men teir ætla at sleppa undan at órógva summarsiglingina við hesum, sigur Magnus Magnusen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni.

Hinvegin má roknast við, at Ternan í fyrsta lagi fer at sigla um Vestmannasund um mánaðarskiftið juni/juli, um einki avloysaraskip fæst fyri Smyril. Tí Smyril verður burtur í seks vikur.

# Ásetingar gerast fyri fólka- og djóraheilsu

*Av tí, at nærum allur útflutningur Føroya er fiskavørur, er sera gagnligt við slíkum sáttmálum, ið áseta góðsku- og reinføriskrøv, sigur Anfinn Kallsberg m.a. í viðmerkingunum til uppskot um heilsufrøðilig viðurskifti við ES*

ÓLAVUR Í BEITI

– Við atliti at gongdini fram móti øktum altjóða handli – her uppi í handli við matvørum – verða karmar tilevnaðir soleiðis, at ásetingar verða gjørdar fyri matvørutrygd, fólkaheilsu og djóraheilsu, bæði í altjóðasáttmálum og økissáttmálum. Limalondini í Altjóðahandilsfelags-skapinum (WTO) hava eisini á heilsufrøðiliga økinum bundið seg til at laga lóggávu sína til meginreglurnar í WTO sáttmálunum.

– Av tí, at nærum allur útflutningur Føroya er fiskavørur, er sera gagnligt við slíkum sáttmálum, ið áseta góðsku- og reinføriskrøv. Umframt at minka um smittuvanda í handli við matvørum, hava slíkir sáttmálar til endamáls at forða fyri, at handil millum lond verður darvaður av tøkniligum krøvum, ið eingi heilsufrøðilig fyrilit hava, sigur løgmaður m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.

**Ísland og Noreg**

Og Anfinn Kallsberg upplýsir, at næstu kappingarneytar okkara – Ísland og Noreg – hava skipað hesi viðurskifti við Evropasamveldið (ES) soleiðis, at teir eru vorðnir partar av heilsufrøðiliga samstarvinum í Evropa gjøgnum EBS.

– Hóast Føroyar eru uttan fyri bæði ES og EBS og útflyta nærum allar okkara vørur til ES marknaðin, hava vit verið fyri stórari ávirkan av gongdini í ES á hesum øki. Ein treyt fyri at kunna kappast við onnur lond er, at støðið á bæði virkjum og framleiðslu, tá talan er um reinføri og góðsku, í minsta lagi er javnbjóðis við tað, sum er í grannalondum okkara. Umframt at føroysk virki og framleiðsla sum heild eru á sama støði sum í londunum kring okkum, fylgja Føroyar eisini minstukrøvum WTO hesum viðvíkjandi.

**Óheppin árin**

– Tað, at Føroyar ikki hava verið partur av heilsufrøðiliga samstarvinum í Evropa hevur havt heldur óheppin árin við sær á føroysku vinnuna, serliga í mun til vinnuna í okkara grannalondum. Her kann millum annað nevnast økt eftirlit við ES markið, har prosentvísi parturin av vøru, ið verður kannaður, er nógv størri enn hjá londum, ið eru partar av heilsufrøðiliga samstarvinum. Avmarkingar í mun til havnir, sum kunnu nýtast sum móttøkuhavnir, hevur eisini verið ein stórur trupulleiki.

– Tískil hevur Føroya Landsstýri havt sum mál at finna ein hóskandi leist fyri Føroyar í heilsufrøðiliga samstarvinum í Evropa. Tað er gjørt bæði fyri at bøta um umstøðurnar hjá føroyskum fiskavøruútflytarum og at tryggja okkum sjálvum og øðrum, at góðska og heilsutrygd í framleiðslu av matvørum í Føroyum er minst á sama støði sum í teimum londum, vit hava samhandil við, sigur Anfinn Kallsberg.

**Broytingar**

– Broytingarnar í verandi støðu verða tískil, at Føroyar skulu einki forboð hava fyri innflutningi av livandi djórum ella djóraúrdráttum úr ES londum og kunnu heldur ikki steðga vørum á markinum inn til Føroya fyri at taka royndir. Afturat hesum verða Føroyar at rokna sum ES mark fyri heilsufrøðiligum eftirliti av djórum og djóraúrdráttum, sum flutt eru inn til Føroya frá triðjalondum

– Í sambandi við útflutning frá Føroyum til ES, verða somu treytir fyri samhandli millum ES limalond á heilsufrøðiliga økinum galdandi fyri fiskavørur og alivørur (har uppi í livandi fiskur), tvískjelja lindýr, fiskamjøl ætlað til djórafóður og óvirkað ull úr Føroyum, sigur løgmaður í viðmerkingunum.

Eftir innbjóðing frá ES-nevndini verður høvi hjá Føroyum at luttaka sum eygleiðari á fundum í arbeiðsbólkum í ES, har spurningar um heilsufrøðilig krøv til fiskivinnu verða viðgjørdir. Ætlanin er, at tilmælið verður lagt fyri felagsnevndina Føroyar-EF til endaliga góðkenning á árliga fundinum í juni 2000 í Tórshavn.

# Nei, tað er ikki Høgni Hoydal

Fleiri fólk hava í gjár og í dag ringt til reklamuhúsið Sansir og Atlantic Airways og spurt, um tað er Høgni Hoydal, sum verður brúktur í eini lýsing fyri flogrutuna hjá Atlantic Airways mikukvøld og sunnukvøld til Keypmannahavnar. Ella um tað er ein tilvitað meining í, at persónurin skal líkjast so nógv Høgna Hoydal.

Men á reklamuhúsinum Sansir siga tey, at persónurin ikki er Høgni Hoydal, sjálvt um teksturin kundi títt upp á, at tað var hann. Har stendur: Ger skjótt av í Keypmannahavn - tak fundarflogfarið.

Personurin á myndini er Olaf Vestergaard. Myndirnar av Olafi vóru tiknar til ein faldara hjá Atlantic Airways fyri trimum árum síðani, also væl áðrenn Høgni var valdur inn á ting, og tí kann heldur ikki sigast, at myndirnar tilætlað líkjast Høgna Hoydal.

Viðgangast má tó, at Olaf á hesi myndini líkist sera nógv Høgna, og at teksturin "Ger skjótt av í Keypmannahavn" saman við myndini hava givið fólki fatan av, at talan er um Høgna.

Men so er ikki.




*Hendan lýsingin hevur fingið fólk at halda, at tað er Høgni Hoydal, sum lýsir fyri Atlantsflog, men tað er tað ikki*